# Restskuldar-tryggin g

BANKNORDIK

## Restskuldartrygging

Restskuldartryggingin gevur tær møguleika at tryggja, at tín skuld ella partur av henni verður útgoldin, um tú doyrt, soleiðis at fíggjarliga byrðan hjá tínum avvarandi verður lættari at bera.

Tryggingarupphæddin verður nýtt til at gjalda inn á tína skuld í BankNordik, um tú doyrt innan 67 ára aldur.

## Hvør kann tekna Restskuldartrygging?

Allir persónar, ið ikki eru fyltir 51 ár, sum hava eitt lán í BankNordik, kunnu tekna eina Restskuldartrygging. Tað er ein treyt fyri at fáa hesa trygging, at tú ert arbeiðsfør/ur, frísk/ur og kanst útflýggja eina nøktandi heilsuváttan.

## Prísur og tryggingarupphæddir

Lánsupphæddin, sum kann tryggjast, er í mesta lagi kr. 1.700.000 fyri hvønn lántakara. Fyri hvønn tryggjaða kann samlaða tryggingarupphæddin fyri Bólkalívstrygging og Restskuldartrygging tó ongantíð fara upp um kr. 3.400.000. Upphæddin á restskuldartryggingini er føst til 67 ára aldur.

| Tryggingarupphædd | 575.000 kr. | 800.000 kr. | 1.150.000 kr. | 1.700.000 kr. |
|---|---|---|---|---|
| Gjald um mánaðin | **143,75 kr.** | **197,71 kr.** | **281,75 kr.** | **413,67 kr.** |

## Útgjald

Tryggingarupphæddin verður goldin inn á tína skuld í BankNordik. Er tryggingarupphæddin hægri enn skuldin, verður avlopið goldið beinleiðis til næsta avvarandi. Um tú ynskir, at upphæddin við deyða skal ognast øðrum enn næsta avvarandi, er møguligt at útfylla eitt oyðublað um broyting av tilskilan. Tryggingarupphæddin verður útgoldin skattafrítt, tó skal arvaavgjald rindast. Neyvari treytir fyri útgjaldi eru at finna í tryggingartreytunum fyri Bólkalívstrygging.

**BankNordik**

Telefon 330 330
kundi@banknordik.fo
www.banknordik.fo